Fíggjarmálaráðið

Dagfesting:	24.09.2026
Mál nr.:	26/21784
Málsviðgjørt:	HI/JEK
Ummælisfreist:	Ikki verið til ummælis
Eftirkannað:	03.09.2026

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin)
(Avgjaldsskyldig søla fevnir ikki um pant)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 136 frá 8. september 1992 um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 15. mai 2026, verður í § 12, stk. 1, sum litra w sett:
"w) Pant sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Orsøkin til uppskotið, at pant á íløtum sambært galdandi reglum skal roknast við í meirvirðisgjaldsskyldigu upphæddina, tá ið vøran verður seld víðari, t.d. frá heilsølu til sølustað.

Verður meirvirðisgjald lagt á pantið, verður upphæddin, sum brúkarin rindar í sambandi við keypið, hægri enn pantupphæddin, sum verður rindað aftur, tá ið ílatið verður latið inn. Við 25 prosentum í meirvirðisgjaldi merkir hetta, at eitt pant á 2 kr. hækkar søluprísin við 2,50 kr., meðan brúkarin fær 2 kr. aftur, og at eitt pant á 4 kr. hækkar søluprísin við 5 kr., meðan brúkarin fær 4 kr. aftur.

Hetta er ikki í samsvari við endamálið við pantinum sum eitt depositum, ið verður rindað fult aftur, tá ið ílatið verður latið inn.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært § 12, stk. 1, í meirvirðisgjaldslógini verður ávís søla hildin uttan fyri avgjaldsskyldiga sølu. Ásetingin hevur eina uppreksing av teimum vørum, tænastum og gjøldum, sum ikki verða roknað við í avgjaldsskyldiga sølu. Pant sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt er ikki nevnt í hesi uppreksingini.

Eftir galdandi reglum skal pant á íløtum roknast við í meirvirðisgjaldsskyldigu upphæddina, tá ið vøra verður seld víðari, t.d. frá heilsølu til sølustað. Hetta hevur við sær, at meirvirðisgjald verður lagt á pantið í søluliðunum.

Atfinningin móti galdandi reglum er tí, at tann upphæddin, sum brúkarin rindar orsakað av pantinum, er hægri enn tann upphæddin, sum verður rindað aftur. Hetta samsvarar illa við endamálið við pantinum sum eitt depositum, ið verður rindað fult aftur, tá ið ílatið verður latið inn.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at pant sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt ikki verður roknað við í avgjaldsskyldiga sølu og sostatt ikki verður meirvirðisgjaldsskyldigt. Við broytingini verður tryggjað, at pantið kann virka sum eitt veruligt depositum, soleiðis at tann upphæddin, sum verður løgd á í sambandi við sølu av vøruni, kann verða rindað fult aftur, tá ið ílatið verður latið inn.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum verður pant sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt undantikið avgjaldsskyldugari sølu. Fyrimunurin er, at pantið kann virka sum eitt depositum, ið verður rindað fult aftur, tá ið ílatið verður latið inn, og at greiðar reglur verða um meirvirðisgjaldsligu viðgerðina av pantinum. Vansin er, at landskassin ikki fær meirvirðisgjald av pantinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis, tí neyðugt er at fáa broytingina framda skjótt, áðrenn nýggja pantskipanin verður sett í verk.

Uppskotið er tó í samsvari við áheitan frá Heilsu- og orkumálaráðnum, sum varðar av løgtingslóg um pantskipan fyri íløt, um at fáa mvg-spurningin loystan, og við sjónarmiðini hjá vinnuni, sum síggjast av skjølum 2 og 3, sum eru skriv frá Handilsvinnufelagnum og Føroya Bjór. Handilsvinnufelagið heitir beinleiðis á Heilsu- og orkumálaráðið um, at pantið verður frítikið fyri meirvirðisgjald, meðan Føroya Bjór mótmælir, at meirvirðisgjald verður lagt á pantið, soleiðis at brúkarin rindar meira í sambandi við keypið, enn hann fær aftur, tá ið ílatið verður latið inn.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Eftir verandi pantskipan skulu innflytarar og framleiðarar krevja pant á 2 kr. og 4 kr., íroknað meirvirðisgjald, og rinda somu upphædd aftur til viðskiftafólk, tá ið sama ílat verður latið inn aftur.

Av tí at ikki øll íløt verða latin inn aftur, verður ein partur av innkravda pantinum ikki rindaður aftur. Hetta hevur við sær, at ein partur av meirvirðisgjaldinum av pantinum verður verandi sum inntøka hjá landskassanum. Við støði í seinastu uppgerðini fyri pantskipanina, sum er frá 2024, verður mett, at henda inntøkan er nakað yvir 500.000 kr. um árið í dag.

Við hesi lógarbroytingini verður pant sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt undantikið meirvirðisgjaldi, og henda meirvirðisgjaldsinntøkan hjá landskassanum fellur tí burtur.

Uppgerðin tekur støði í ársuppgerðini fyri einnýtsluíløt frá 2024 hjá Umhvørvisstovuni og í uppgerðini hjá Rúsdrekkasøluni fyri einnýtsluíløt úr glasi, sum ikki eru fevnd av galdandi pantskipan, men sum Rúsdrekkasølan kortini hevur pant á. Miðal pantvirði verður mett at vera 2,27 kr. v/mvg.

Pant 2024	Nøgd	Upphædd
Selt	14.446.087	32.792.617
Retur	13.323.990	30.245.457
Munur	-1.122.097	-2.547.160
Mvg eftir í landskassanum frá panti í 2024		509.432

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Handlar, innflytarar og framleiðarar fara at viðgera pantið uttan meirvirðisgjald. Hetta er tó í samsvari við ynskið hjá vinnuni og verður tí ikki mett at hava neiligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur onga ávirkan á millumtjóða sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur onga ávirkan á tvørgangandi millumtjóða sáttmálar.

2.9. Markaforðingar og flytføri
Uppskotið hevur ongar markaforðingar ella ávirkan á flytføri.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur onga áseting um revsing, fyrisitingarligar sektir, tvingsilssektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Talan er um eitt skattauppskot.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur onga áseting um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur uppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið leggur ongar heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Heimilar uppskotið viðgerð av persónsupplýsingum?
Uppskotið heimilar ikki viðgerð av persónsupplýsingum.

2.17. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.18. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Sambært løgtingslóg um pantskipan fyri íløt er pantið at rokna sum ein partur av vøruni. Fyri at koma sær undan, at meirvirðisgjald eisini verður lagt á pant, sum í roynd og veru er eitt depositum, er neyðugt positivt at frítaka pantið frá avgjaldsskylduni. Á tann hátt kann pantið fáa sín ætlaða virknað sum eitt depositum, sum verður hildið aftur í pantskipanini og rindað óskert aftur til tann, sum ber pantskipanini tað pantskyldiga ílatið aftur til endurvinning ella endurnýtslu.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 24. september 2026

Aksel V. Johannesen
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Áheitan frá Handilsvinnufelagnum til Heilsu- og orkumálaráðið
Fylgiskjal 3: Bræv frá Føroya Bjór til Fíggjarmálaráðið um MVG á pant